# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*



Tann 19. desember fekk Torgerð eina lítlasystir. Hon vigaði 4230 gr og var 53 cm. Foreldrini eru Esther Suðuroy og Dagfinn Olsen.

**Føðingar**

18. desember fingu Karolina Láberg og Jan Max Andreasen, Tórshavn, ein son. Hann var 55 cm. langur og vigaði 3600 gr.

20. desember fingu Kristbjørg Djurhus og Sonni L. Petersen, Rituvík, ein son. Hann var 53 cm. langur og vigaði 3225 gr.

21. desember fingu Kirstin Danielsen og Rúni Hansen, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 53 cm. long og vigaði 3200 gr.

21. desember fingu Ivonna Johansen og Sune Strøm, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 50 cm. long og vigaði 2770 gr.

21. desember fingu Beinta Nørspang og Arnstein Davidsen, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 54 cm. long og vigaði 3600 gr.

23. desember fingu Beinta og Jan Laursen, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 50 cm. long og vigaði 2800 gr.

24. desember fingu Marian á Borg og Bogi Midjord, Hoyvík, ein son. Hann var 56 cm. langur og vigaði 4100 gr.

25. desember fingu Vivian Unadóttur og Regin Petersen, Århus, eina dóttur sum var 50 cm. long og vigaði 3380 gr.

**70 ár**

Sunnudagin 30. desember verður Anna Louisa Falkenberg, Tórshavn, 70 ár. Dagurin verður hildin á Torkilsgøtu 6, frá kl. 12.00-18.00.

**90 ár**

Í dag 28. desember fyllir Jana Jacobsen, ættað úr Fuglafirði, búsitandi í Havn 90 ár.

**Diamantbrúdleyp**

Í dag, 28. desember kunnu hjúnini Davina og Andrias Sundskarð halda Diamantbrúðleyp. Dagurin verður hildin fra kl. 17 til 21 hjá svigardóttrini á Fossagøtu 28. Øll eru vælkomin.

**Gullbrúdleyp**

Leygardagin 29. decembur hava Elinborg og Sólvit Simonsen á Sandi gullbrúdleyp. Tey ið vilja heilsa teimun, eru vælkomin í Ungmannafelagshúsið Virkið frá kl. 18.

Nýggjársdag 1.1.2008 hava Marita og Egin Ørvarodd á Sandi gullbrúdleyp. Tey ið vilja hátíðarhalda dagin saman við teimum eru vælkomin í Missiónshúsið á Sandi frá kl. 18.00.

**Brúdleyp**

Leygardagin 29-12-07 kl. 14.00 giftast í Hoyvíkar kirkju, Árni Hoydal Thomassen úr Hoyvík & Sylvia Katrina Hansen úr Tórshavn.Veitslan verður fyri innbodnum í HB-Húsinum kl. 19.00.

Leygardagin 29. desember kl. 15.00 giftast í Vestmanna kirkju Birita Andreasen, Vestmanna og Bárður H. Joensen, Hvítanes. Veitslan verður fyri innbodnum í B36-húsinum kl. 18.30.

Leygardagin 29. desember kl. 16.00 giftast í Argja kirkju Hanna Dam og Jens Michal Tróndheim. Veitslan verður fyri innbodnum í neystinum hjá Argja Róðrarfelag kl. 18.00.

Leygardagin 29. desembur kl 12 giftast í býráðssalinum í Tórshavn, Esther Kristiansen, Æðuvík, og Flóvin av Fløtum Jespersen, Tórshavn. Kl 15.30 er døgurði fyri innboðin og kl 20 er opið hús í Støðlagøtu 13, Argir. Øll eru hjartaliga vælkomin.

29. desember giftast Tóri Slættalíð og Ingigerð á Steig. Vígslan verður í Oasuni í Hoyvík kl. 10 og veitslan verður fyri innbodnum á sama stað kl. 14.

Leygardagin 29. desember kl 15.00 giftast í Rituvíkar kirkju Turið Lamhauge Petersen av Toftum og Jón Nónklett úr Lamba. Brúdleypið verður fyri innbodnum á Sjókaféini í Runavík kl. 19.00.

Leygardagin 29. des. kl. 15.00 giftast í Vágs kirkju Hjørdis Ryggshamar, Vágur og Sigurð Marner Simonsen, Sandur. Veitslan verður fyri innbodnum í Framtíðini.

Leygardagin 29. desember kl. 15 giftast í Miðvágs kirkju, Unn Hansen, Miðvágur og Árni Krog Dalsgaard, Skálavík. Veitsla verður fyri innboðin á Hotel Vágum kl 19.



Sunnudagin 30. desember 2007 giftast Poula Norðbúð, Tórshavn og Bill Mc. Leod Jacobsen, Klaksvík. Vígslan verður í Havnar Kirkju klokkan 15.00 og veitsla fyri innbodnum á Hotel Føroyum klokkan 19.00. Brúðarhús verður í heiminum á Reyðugøtu 7, 100 Tórshavn, 31. des.



29. desember kl. 15.00 giftast í Filadelfia í Havn Jesse og Boaz. Veitslan verður fyri innbodnum á Hotel Føroyum kl. 19.00.

# Næmingar í Sankta Frans Skúla hittast aftur

**Í sambandi við at skúlanæmingar sum gingu í Sankta Frans Skúla til 7. flokk í 1967, hava ætlanir um at hittast aftur í 2008, hava vit fingið mynd og tekst frá Helga Joensen og Fríðgerð Mouritsen, sum fara at samskipa tiltakið**

Nú 40 ár eru liðin, síðan vit fóru úr Sankta Frans Skúla, er ætlanin at vit øll, bæði gentur og dreingir, møtast aftur fyri at minnast aftur á gamlar dagar og annars at hugna okkum.

Fyrireikingarnar eru byrjaðar, og fyri at tað skal bera til hjá helst øllum at vera við, verður hugsað um, at dagurin skal vera 30. desember 2008.

Síðan vit fóru úr skúlanum, eru vit farin í allar ættir, og vit vita ikki í dag, hvar øll búgva.

Vit vilja tí á hendan hátt siga tykkum frá tiltakinum, og biðja tykkum um at senda okkum navn og bústað v.m.

Onkur er kanska sum ikki sær hesa eftirlýsing. Tí heita vit eisini á familju ella vinfólk um at siga teimum sum t.d. búgva uttanlands frá hesari eftirlýsing.

Tit kunnu ringja til Helga Joensen, tel. +298 217616. mail: hvitanes@gmail.com ella Frígerð Mouritsen, tel. +298 315154 ella +298 583520. mail: frigerd@kallnet.fo.

Vónandi frætta vit skjótt.



*Vit hava onga mynd av dreingjunum, men her er ein mynd av gentunum, sum er tikin skúlaárið 1964/65. Aftara rað f.v.: Súsanna Djurhuus, Marjun Lindenskov, Marna Skylv Hansen, Hallgerð Joensen, Kristina Enghamar, Sunrið Berg Vilhelmsen, Guðrun Rein og Frígerð Hansen.*

*Fremra rað f.v.: Elsa Johanna Rasmussen, Borgarhjørt Kragesteen, Marjun Hanusardóttir Jensen, Anna Hansen, Annvør Lávík, Eyð Vørðstein, Edna Brockie, Bjørg Larsen, Annika í Jákupsstovu, Hannebeth Dam, Ida Mikkelsen, Systir Louisa (lærari) og Anna Maria Vilhelmsen*

** Um onkur veit um eina mynd av dreingjununum, er viðkomandi vælkomin at seta seg í samband við Helga Joensen ella Frígerð Mouritsen. Dreingir og gentur gingu í hvør sínum flokki, dreingirnir gingu í 7.a og genturnar í 7.b*

***Genturnar í 7.b skúlaárið 1966/67 vóru:** Britta Andrea Bendtsen, Edna Cecilia Brockie, Hanna Elisabeth Dam, Johanna Elin Hammersheimb Debess, Malena Mina Enghamar, Anna Hansen, Frígerð Hansen, Marna Skylv Hansen, Annika í Jákupsstovu, Marjun Hanusardóttir Jensen, Hallgerð Joensen, Bjørg Súsan Larsen, Annvør Laura Lávík, Marjun Esther Lindenskov, Borghjørt Kragesteen, Ida Bendix Mikkelsen, Guðrun Rein, Súsanna Elna Joensen, Edna Jacobina Simonsen, Elsa Johanna Rasmussen, Anna Maria Vilhelmsen, Sunrið Berg Vilhelmsen, Eyð Sigrun Vørðstein, Kristina Enghamar, Súsan Lind*

***Dreingirnir í 7.a skúlaárið 1966/67 vóru:** Hans Andreas Dam, Høgni í Dali, Sámal Hammersheimb Debess, Regin Hansen, Niels Johannes Hansen, Ragnar Hansen, Henrik Hilligsøe, Helgi Joensen, Jógvan Joensen, Jóanes Sekjær Nielsen, Regin Herup Olsen, Erik Krogh Olesen, Snorri Poulsen, Steingrím Samuelsen, Kolbein Simonsen, Kenneth Stampe, Ólavur Øster, Jón Ellendersen og Michael Detrekøy*

Sig tína meining
í Sosialinum